# 500 húsvill ítróttarfólk

**Kí høllin nøktar als ikki tørvin fyri ítróttinum í Klaksvík, sambært formanninum í Klaksvíkar Badmintonfelag Jákup Anthoniussen. Hann metir, at minst 500 ítróttarfólk í býnum ikki hava nøktandi venjingarumstøður. Tí er felagið farið í holt við at arbeiða fyri at lata eina nýggja ítróttarhøll byggja**

ÍTRÓTTARHØLL
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*


*Tørvurin á eini nýggjari ítróttarhøll í Klaksvík er ovurhondsstórur, sambært Jákupi Anthoniussen formanni í Klaksvíkar Badmintonfelag, sum av álvara er farin í gongd við eina verkætlan, sum umfatar eina nýggja ítróttarhøll í býnum*

**Klaksvík:** – Støðan er syndarlig hjá fleiri feløgum og einstaklingum, sum vilja venja, tað er púra vist, sigur formaðurin í Klaksvíkar Badmintonfelag, Jákup Anthoniussen.

Hann sigur, at tað er fullkomuliga ógjørligt hjá felagnum at fáa tímar í KÍ høllini, og soleiðis sum hann hevur skilt tað, so er støðan tann sama hjá Fimleikarafelagnum og Mjølni.

– Tað vil siga, at tað eru minst 500 ítróttarfólk umframt onnur, sum ikki hava nøktandi umstøður at venja í, sigur Jákup Anthoniussen.

Jákup sigur, at felagið hevur søkt um byggiloyvið og byggilendið, har tann nýggja høllin skal standa, er økið vestan fyri svimjihøllina, og hon kemur at standa suður og norður paralellt við svimjihøllina.

## Syndarligar umstøður

Jákup sigur, at tað er ongin livandi møguleiki hjá Badmintonfelagnum at sleppa inn í KÍ høllina nakrar tímar um vikuna, so tey máttu í holt við fimleikarhøllina. Tað er leiðslan í skúlanum við Ósánna, sum umsitur báðar fimleikarhallirnar, men har var svarið tað sama.

– Vit fingu at vita, at báðar hallirnar eru fult upptiknar, men at vit kundu senda eina umsókn inn og koma upp í køina, sum bíðar eftir plássi, greiðir Jákup frá.

Tað endaði so við, at felagið bað um at fáa hallirnar leygardagar. Og tað bar so til. Men av tí sama mugu venjingarnar hjá teimum byrja rættuliga tíðliga leygardagar, og tá Mjølnir hevur brúk fyri hallunum til dystir, má Badmintonfelagið víkja.

Jákup metir sum sagt, at limatalið í Mjølni, fimleikarafelagnum og badmintonfelagnum tilsamans liggur um minst 500 og óivað væl fleiri enn tað, og hann heldur tað er alt ov galið, at umstøðurnar eru so vánaligar.

– Ein nýggj ítróttarhøll skuldi langt síðani verið komin, sigur hann avgjørdur.

## Komnir væl áleiðis

Í september í fjør fór Badmintonfelagið av álvara í gongd við arbeiðið at útvega eginpening til eina nýggja ítróttarhøll. Felagið sendi brøv út til virki, stovnar og skip um alt landið og søktu um stuðul til eginpeningin.

Kostnaðurin av høllini er mettur at vera um 14 milliónir krónur. Hon kemur at verða 35 metrar breið og góðar 50 metrar long og fer at hava allar hentleikar, sum ein ítróttarhøll eigur at hava. Vanliga mannagongdin er, at landið stuðlar 30%, kommunan 30% og so skal Badmintonfelagið taka tey 40%, sum eru eftir. Tað vil siga, at lánið hjá felagnum kemur at verða um 5,6 milliónir krónur. Og tað metir Jákup, at felagið fer at megna at arbeiða við.

– Høllin skal leigast út júst sum KÍ høllin, men tað er eyðsæð, at tey feløgini, sum ongastaðni hava at vera, skulu fáa ógvuligar góðar sømdir at sleppa inn, sigur formaðurin í Badmintonfelagnum í Klaksvík.

Hann sigur, at tað er av alstórum týdningi, at tað verður arbeitt skjótt við hesum málinum, og hansara ynski er, at høllin stendur liðug, áðrenn undirsjóvartunnilin verður liðugur. Annars er hann bangin fyri, at tað verður ov seint.

Jákup heldur, at tað kann hugsast, at alt fer inn í Eysturoynna, um høllin ikki er liðug áðrenn tunnilin.

– Við eini nýggjari høll minkar trýstið á KÍ høllini munandi, og umstøðurnar verða dupult so góðar, sigur Jákup Anthoniussen, sum trýr uppá, at ein nýggj ítróttarhøll verður í Klaksvík, áðrenn Norðoyatunnilin letur upp.

## Peningur settur av

Klaksvíkar býráð tekur væl undir við ætlanunum hjá Badmintonfelagnum. Borgarstjórin, Steinbjørn Jacobsen sigur, at 400.000 krónur eru settar av til eina nýggja ítróttarhøll á fíggjarætlanini hjá kommununi.

– Tað er sera átrokandi, at ein nýggj høll verður bygd í Klaksvík, sigur borgarstjórin. Býráðið hevur givið Badmintonfelagnum eina freist til seinast í mai mánaði at koma við eini ítøkiligari ætlan um eina nýggja ítróttarhøll.

# Grótavtala komin í hús

**Klaksvíkar kommuna og pf Norðoyatunnilin hava gjørt eina endaliga avtalu um grótið, sum kemur úr tunlinum Borðoyarmegin. Samráðingar eru framvegis um grótið, sum eftir ætlan skal førast yvir um Leirvíksfjørð**

GRÓTAVTALA
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*



*Klaksvíkar kommuna fær upp til 300.000 kubikk av gróti Borðoyarmegin og 100.000 kubikk Eysturoyarmegin úr Norðoyatunlinum til verkætlanir hjá kommununi*

*Savnsmynd*

**Klaksvík:** Eitt mál, sum var á skránni á ársins fyrsta býráðsfundi, var grótavtalan millum kommununa og Norðoyatunnilin.

Avtalað er, at Klaksvíkar kommuna kann fáa upp til 300.000 kubikk av grótinum, sum kemur upp Borðoyarmegin. Grótið fer til ymsar verkætlanir, sum liggja fyri framman í býnum.

Steinbjørn Jacobsen, borgarstjóri, er vælnøgdur við avtaluna, sum hann heldur vera góða.

– Tað kemur at verða ein millumrokning uppá 2,7 milliónir, sum kommunan skal rinda, men tað er ikki so nógv, heldur borgarstjórin. Hann sigur, at í avtaluni er flutningurin av grótinum til tað stað, har tað skal nýtast eisini er við í avtaluni. Klaksvíkar kommuna eigur og hevur gjørt vegin, sum er út til bátahylin í Borðoyavík, og hann fær kommunan so kompensatión fyri frá Norðoyatunlinum, og er millumrokningin sostatt 2,7 milliónir krónur.

## Grót hinumeginfrá

Klaksvíkar kommuna fær umleið 100.000 kubikk úr tunlinum leirvíkarmegin frá. Steinbjørn sigur, at tað ikki er endaliga avgjørt enn, hvussu hetta kemur at ganga fyri seg. Leirvíkar kommuna skal eisini brúka grót, sum kemur úr tunlinum, so har eru samráðingar í gongd. Samráðst verður somuleiðis um prísásetingina.

Borgarstjórin sigur, at tað kann tykjast at ljóðar dýrt at flyta so nógv grót um fjørðin, men hann heldur, at tað kann fara viga upp móti sparingunum á vegakervið og trygdina, sum verður við, at alt hetta grótið verður flutt sjóvegis heldur enn eftir vegnum og gjøgnum býin frá Borðoyarvík og allan vegin norður í Ánirnar til góðshavnina.

Annars væntar Steinbjørn Jacobsen ikki, at kommunan fær nakað av grótinum Borðoyarmegin fyrr enn seint í vár ella í summar, tí tað fyrsta, sum kemur upp, skal Norðoyatunnilin brúka.

– Júst hvussu verður við tí, veit eg ikki beint nú, men tað verður so í fyrsta lagi í apríl, tí teir byrja ikki at bora fyrr enn tá, sigur borgarstjórin í Klaksvík.

Annars frættist, at byrjað verður at grava og at gera alt tilreiðar til boringina í apríl, í hesu vikuni.



# Ósemja um eftirlønarskipan

**Javnaðarflokkurin og Fólkaflokkurin eru ikki samdir um, hvussu eftirlønin skal skipast. Partarnir eru kortini sannførdir um, at ein loysn verður funnin á ósemjuni. Mikumorgunin hildu Javnaðarflokkurin, Sambandsflokkurin og Fólkaflokkurin á við samráðingunum um arbeiðsmarknaðarmál**


*Javnaðarmaðurin, Hans Pauli Strøm, rættar peikifingurin ímóti Jørgen Niclasen og hinum Fólkafloksmonnunum. Javnaðarflokkurin tvíheldur um samhaldsføstu eftirlønarskipanina*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

SAMGONGUSAMRÁÐINGAR
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Fyrsta veruliga ósemjan undir samgongusamráðingunum á Gamla Apoteki millum Javnaðarflokkin, Sambandsflokkin og Fólkaflokkin er veruleiki. Síðan týskvøldið hava teir tríggir flokkarnar umrøtt arbeiðsmarknaðarmál.

Ósemja hevur stungið seg upp millum Javnaðarflokkin og Fólkaflokkin um eftirlønarviðurskiftini. Javnaðarflokkurin tvíheldur um eina samhaldafasta eftirlønarskipan, meðan Fólkaflokkurin hellir til eina privata uppsparing. Sambandsflokkurin er ikki so avgjørdur í hesum málinum og liggur tí ímillum partarnar.

Samráðingarpartarnir fara at nýta stóran part av mikudegnum til at halda á við at viðgera arbeiðsmarknaðarmál. Arbeiðsmarknaðarøkið er eymt økið og tí er als ikki óhugsandi, at hugsjónarligu munirnir millum Javnaðarflokkin einumegin og serliga Fólkaflokkin hinumegin gerast ein trupulleiki.

## Krav

Javnaðarflokkurin vil ikki hoyra nakað um eina privata uppsparing, sum Fólkaflokkurin mælir til. Umboðini fyri Javnaðarflokkin vilja betra samhaldsføstu eftirlønarskipanina.

Í løtuni lata arbeiðstakarar og arbeiðsgevarar hvør sítt hálvt prosent í samhaldsføstu eftirlønarskipanina. Javnaðarflokkurin ynskir at økja inngjaldið við einum prosenti, so arbeiðstakarar og arbeiðsgevarar koma at rinda hálvt annað prosent í part til skipanina.

Samhaldsfastið er eitt av aðalmálum Javnaðarflokksins og sum skilst hevur flokkurin ongar ætlanir um at geva seg á hesum øki.

## Privat uppsparing

Fólkaflokkurin ynskir hinvegin eina privata uppsparing. Arbeiðstakarar og arbeiðsgevarar skulu í samráð áseta ein part av inntøkunum til eftirløn. Fólkaflokkurin mælir til, at partarnir á arbeiðsmarknaðinum sjálvir finna eina hóskandi skipan fyri sínar limir.

Endamálið er, at so nógv sum gjørligt tryggja sína egnu privatu eftirløn. Fleiri fakfeløg hava í dag privata eftirlønarskipan, sum Fólkaflokkurin skýtir upp skal galda fyri allan arbeiðsmarknaðin. Eitt dømi er Føroya Postfelag, har limirnar rinda 5,5 % og felagið 7,5 %. Samlaða inngjaldið er sostatt 13 %.


*Jørgen Niclasen hevur ongar ætlanir um at standa aftanfyri Hans Paula Strøm og Javnaðarflokkin og peikar aftur. Fólkaflokkurin skýtir upp eina privata eftirlønarskipan.*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

## Bjørt útlit

Hóast verandi ósemju um eftirlønina, hava partarnir góðar vónir um at finna eina semju um arbeíðsmarknaðarmálini. Kemur arbeiðsmarknaðarøkið undir land mikudagin, gerast útlitini fyri eini ABC samgongu alsamt bjartari.

Ríkisrættarliga støðan, vinnumál, fiskivinnumál, fíggjarmál og samferðslu mál eru øll løgd afturum. Av málsøkjunum sum framvegis ikki eru viðgjørd kunnu nevnast skúla-, mentanar-, umhvørvis- og orkumál. Eftir ella um øll málsøkini koma undir land, er býtið av landsstýrissessum eftir.

Hvussu telvingin um landsstýrissessirnar fer at spæla av, er ilt at gita um, men tað er als ikki óhugsandi, at býtið av landstýrisessum verður størsti knúturin undir samráðingum millum teir tríggjar flokkarnar á Gamla Apoteki.

Samráðingarpartarnir lata framvegis væl at stevinum og góðar vónir eru um eina samgongu millum Javnaðarflokkin, Sambandsflokkin og Fólkaflokkin.

## Flokkarnir farnir hvør til sín

**Samráðingarpartarnir, Javnaðarflokkurin, Sambandsflokkurin og Fólkaflokkurin eru farnir hvør til sín. Fólkaflokkurin ynskti ein steðg til at umrøða eftirlønina innanhýsis í flokkinum**

SAMGONGUSAMRÁÐINGAR
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Stutt fyri okkara seinastu freist, hevur Fólkaflokkurin ynskt ein stuttan steðg í samráðingunum. Javnaðarflokkurin, Sambandsflokkurin og Fólkaflokkurin hava framvegis ikki funnið eina semju um eftirlønina. Teir tríggir flokkarnir umrøða nú málið innanhýsis í flokkunum.

Enn er ilt at siga, hvussu stórur knúturin er og hvussu langt partarnir er frá hvørjum øðrum. Eftirlønarviðurskiftini hava verið viðgjørd síðan týskvøldið og á døgurða mikudagin er framvegis eingin semja funnin.

Verður semja funnin um eftirlønina, kemur Barsilsskipanin á skránni seinni mikudagin.